gult20 cyan20 magenta20 svart20



## Clickhaze:
# Taka tað róligt hesaferð

**Clickhaze hevur lært av sínum vónbroti á Prix finaluni fyri tveimum árum síðan, tá vónir og ambitiónir vóru so høgar, at tað gekk út yvir framførsluna. Hesaferð tekur bólkurin tað meira róligt, og minni trýstir, men minst líka ambitøsir, fara tónleikararnir aftur á finalupallin leygarkvøldið. Vit hava spurt Jón Tyril úr Clickhaze hvat er í væntu.**



*Rúnar Reistrup*

*Sjálvsálitið var stórt og vónirnar tað sama, tá tit fóru til Prix finaluna seinast. Hvussu stórt var skuffilsi aftaná?*

– Tað fór eitt sindur av sporinum hjá okkum seinast. Fólk væntaðu sera nógv av okkum, aftaná at vit vunnu undankappingina í Miðvági, og tað legði nokkso stórt trýst á okkum. Men eg haldi ikki at vit blivu so skuffaði, tí vit høvdu hóast alt ikki væntað at vinna. Hinvegin bleiv tað so nógv hóvasták burturúr okkum, og vit vandu ov nógv og gjørdust strongd, so tá vit endiliga stóðu á pallinum í finaluni spældu vit als ikki so væl sum vit burdu, og tað var nokkso keðiligt, tí vit vildu sjálvsagt spæla so væl sum gjørligt og geva fólki eitt gott upplivilsi.

Hesum hevur Clickhaze tikið við læru av, og í ár hevur bólkurin tikið tað meira róligt, og til undankappingina í Vági valdi bólkurin at taka tað lætta sinnið við.

– Vit høvdu ikki roknað við at sloppið víðari, so tað undraði okkum nógv, at vit vunnu. Vit vandu bara fýra ferðir áðrenn, og vit roknaðu ikki við nøkrum. Og tá vit so hoyrdu Týr spæla, so væntaðu vit tað enn minni. Men eg haldi at tað, at vit tóku tað róligt og sóu stórt upp á úrslitið hevði ein stóran lut í æruni fyri at vit vunnu.

Venjingarnar undan finaluni byrjaðu ikki fyrr enn í farnu viku, men stilla tempoið skal ikki misskiljast sum at Clickhaze hevur mist sínar ambitiónir.

– Tónleikararnir í bólkinum eru sera ambitiøsir, men tað ber ikki til at venja á sama hátt sum vit gjørdu fyri tveimum árum síðan. Vit eru øll sera upptikin, og onkur hevur verið uttanlands og spælt og kom ikki heim fyrr enn í farnu viku. Tí ber tað ikki til hjá okkum at venja so ofta.

*Hvat er hent við Clickhaze meðan eingin hevur hoyrt nakað til tykkum?*

– Vit kenna hvønn annan nógv betur nú, bæði persónliga og tónleikaliga. Tað er ein fyrimunur.

Eg haldi eisini, at tónleikararnir hava ment seg hvør sær. Onkur hevur verið á tónleikaskúla og onnur hava fingist við tónleik á annan hátt, og Eivør hevur eisini gjørt eitt risalop í sínari karrieru seinastu tvey árini og hevur spælt og sungið sera fjølbroyttan tónleik. Hetta er alt ein fyrimunur fyri tað samlaða úttrykkið í bólkinum vildi eg mett.

Hvat tónleikinum hjá okkum viðvíkur, so er hann blivin bæði vakrari og ljótari og mildari og ógvusligari enn hann hevur verið. Eg haldi eisini at tú kanst siga hann meira stílreinur

nú enn hann plagdi at vera.

*Hvørjar vónir hava tit til finaluna?*

– Eg trúgvi at vit fara at spæla væl í finaluni hesaferð. Sjálvandi hevði tað eisini verið stuttligt at vunnið, men tað eru ikki vit, sum avgera tað. Eg haldi at næstan allir bólkarnir mugu roknast sum møguligir vinnarar av Prix Føroyrar finaluni.



## Flux:
# Seta sína vón til festivalirnar

**Flux vil sleppa út um Føroyar at spæla, og tónleikararnir seta sínar vónir til, at framførslan á finaluni fer at vinna teimum pláss á einum av teimum báðum festivalunum, sum í samstarvi við Prix Føroyar leggja pall til ein finalubólk. Vit hava spurt trummuspælararan í Flux, Svein Gaard Olsen, um vónirnar undan finaluni.**



*Rúnar Reistrup*

Síðstu ferð Flux vóru við á Prix finaluni blivu teir umtalaðir sum teir ungu evnaríku tónleikararnir, sum púra óvæntað komu víðari. Hesuferð bleiv eingin ovfarin av at síggja Flux kvalifisera seg, og hóast limirnir í bólkinum aftur eru teir yngstu tónleikararnir í finaluni, so hoyrir Flux til tey etableraðu nøvnini á finaluskránni.

*Hvussu var tað at gerast kendir frá einum degi til annan í samband við Prix '99?*

– Eg haldi at tað bleiv eitt sindur ov nógv uppskrúvað, eftir at vit høvdu kvalifiserað okkum til finaluna. Vit blivu róstir langt upp um skýggini, hóast vit kanska ikki vóru so góðir kortini. Og vit blivu beinanvegin bidnir um at spæla til nøkur stór tiltøk, sum vit í veruleikanum ikki vóru klárir til. Men annars var tað bara stuttligt at fólk knappliga kendu til okkum.

*Hvussu er Flux nú samanborið við Flux á síðstu Prix finaluni?*

– Vit eru nógv betri. Vit spæla betri, tónleikurin er meira gjøgnumførdur, og løgini eru betri. Tónleikurin hjá okkum er blivin eitt sindur tyngri, men tað ljóðar enn sum Flux altíð hevur ljóðað.

*Hvørjar vónir hava tit til finaluna?*

– Um vit fáa eina topp 3 plasering, so verða vit øgiliga glaðir. Men tað sum vit nokk satsa mest uppá er at sleppa á ein festival at spæla. Vit hava eina trúgv uppá, at millum finalubólkarnar eru vit ein teimum av teimum bólkunum, sum hóska best til at spæla á festivalum uttanlands. Eg kundi fyristilla mær, at okkara tónleikur passar væl til tey ynskir, sum festivalarnir hava. Tí hava vit helst betri møguleika at fáa eina festivalframførslu burturúr finaluni enn at vinna hana.

*Hvat fer at henda við Flux aftaná finaluna?*

– Næsta projekt verður at geva eina fløgu út. Annars er ætlanin bara at halda fram við at spæla. Vónandi fáa vit høvi til at spæla eitt sindur uttan fyri Føroyar eisini.



gult21 cyan21 magenta21 svart21



# Týr

Týr sá dagsins ljós fyri góðum tveimum árum síðan, tá Heri Joensen og Kári Streymoy, sum fyrr hava spælt saman í Wolfgang, tóku seg saman um at stovna ein nýggjan bólk saman.

Seinni løgdust tríggir tónleikarar afturat, tann seinasti, sangarin Pól Arni Holm, kom við í januar í fjør.

Limirnir í Týr vóru fyrstu tíðina allir útisetar í Keypmannahavn, men síðan tá er bassleikarin Gunnar Thomsen fluttur aftur til Føroya. Basin hjá bólkinum er tó enn í venjingarkjallaranum á Oyrasundskollegienum.

Týr spælir harðan rocktónleik við íblastri úr klassiskum- og fólkatónleiki, serliga úr føroyskum kvæða- og táttasiðinum. Orðafarið snýr seg einamest um víkingatíðina og nakrar av teimum hendingum, ið har fóru fram.

Á vevsíðuni www.tyr.musiconline.dk ber til at lesa og hoyra meira til Týr.

*Tónleikararnir í Týr eru:*

| | |
|---|---|
| **Pól Arni Holm** | **forsangari** |
| **Heri Joensen** | **gittar og sang** |
| **Jón Joensen** | **gittar og sang** |
| **Gunnar H. Thomsen** | **bass og sang** |
| **Kári E. Streymoy** | **trummur og sang** |

# I Am

I Am hevur verið til síðan 1996, tá teir báðir Birgir Sigurðsson og Eyðbjørn Jacobsen tóku seg saman at stovna ein gospelbólk. Afturat sær fingu teir sum frá leið Hans Ova Johansen, Heðin Olsen og Mikkjal Hvannastein afturat sær.

Síðan tá hevur manningin verið óbroytt, men bólkurin hevur hinvegin broytt seg ikki sørt.

Fyrstu tíðina spældi bólkurin bert til møtir og onnur andalig tiltøk, og tónleikurin var tað, sum sangarin, Birgir, best heldur kann nevnast »bygdatónleikur«.

Seinni gjørdist tónleikurin eitt sindur harðari og tyngri og framførslan hjá I Am í undankappingini á Prix Føroyum í 1999 gjørdist eitt rættiligt gjøgnumbrot fyri bólkin, hóast hann ikki kom víðari.

Í tey tvey árini síðan síðstu Prix kapping hevur bólkurin givið vælumtóktu fløguna »Cast« út, spælt til eina ørgrynnu av tiltøkum, harímillum á Ólavsøkukonsertini og á Broadway og Laugardalshøllini í Íslandi.

*Tónleikararnir í I Am eru:*

| | |
|---|---|
| **Birgir Ingolf Sigurðsson** | **sang** |
| **Eyðbjørn Jacobsen** | **bass** |
| **Hans Ove Johansen** | **trummur** |
| **Heðin Olsen** | **keyboard** |
| **Mikkjal Hvannastein** | **gittar** |

# Tám

Hóast Tám er eitt nýtt navn á føroyska tónleikapallinum, so er talan um royndar tónleikarar, sum hava spælt saman regluliga í nógv ár.

Bólkurin er ein útbygging av kjarnuni í dansibólkinum »Sólvá og Bergmenn« sum man vera ein av virknastu dansibólkunum í landinum.

Tám kvalifiseraði seg til Prix finaluna við at gerast nummar tvey í undankappingini í Klaksvík.

Tám spælir melidiøsan rocktónleik.

*Tónleikararnir í Tám eru:*

| | |
|---|---|
| **Sólva H. Ford** | **sang** |
| **Ronnie Nielsen** | **trummur og sang** |
| **Kolbein Simonsen** | **bassgittar** |
| **Hans Karl Hansen** | **gittar** |
| **Jóhan Petur Andreassen** | **hammond** |
| **Rói Højgaard** | **ásláttur** |
| **Georg eystan Á** | **gittar og sang** |
| **Gudny D. Højgaard** | **kór** |
| **Guðri Hansen** | **kór** |
| **Rúna á Heygum** | **kór** |

# Tangz

Tangz er ein samanrenning av bólkunum Deep End, Lokum og The Hanky Stuff. Gjøgnum hesar tríggjar bólkar hava allir tónleikararnir í Tangz verið um hvønnannan.

Tá ið nakrir av liminum í The Hanky Stuff fluttu til Danmarkar í '97, tóku teir eftirsitandi seg saman og stovnaðu ein nýggjan bólk við tí endamáli at spæla cover-løg. Kært barn har mange navne, og áðenn Tangz fór at eita Tangz hevði bólkurin nøvn sum Funny Boyz, Happy Friends, Sjors og onnur.

Bólkurin var upprunaliga ikki gjørdur við tí fyri eyga at komponera og ambitiónirnar vóru lítlar og ongar.

Men um heystið ´98 var undankappingin til Prix Føroyar útskrivað, og hetta høvið til at royna at skriva egnan tónleik lat Tangz ikki fara afturvið borðinum.

Bólkurin var ikki stovnaður til Prix Føroyar, heldur kom prixið væl við. Við egnum tónleiki og nakað av ambitiónum, var tørvur á nýggjum navni, sum so bleiv Tangz.

Tangz stóð seg væl í Prix '99, og var nógv eftirspurdur aftaná. Bólkurin hevur verið uttanlands nakrar ferðir. Tvær ferðir hevur hann spælt á føroyinga-vinarliga Gimle, og í fjør luttók bólkurin á Jazz Festivalinum í Reykjavík.

Harafturat hevur bólkurin eisini givið eina stakfløgu frá hondum, sum nú er útseld.

*Tónleikararnir í Tangz eru:*

| | |
|---|---|
| **Rókur Jacobsen** | **sang** |
| **Dánjal Dam á Neystabø** | **keyboard** |
| **Hallur Johannessen** | **bass** |
| **Halgir W. Arge** | **trummur** |
| **Róði H. Christiansen** | **gittar** |

# All That Rain

All That Rain kom til verðina, tá Kjølar fóru í søguna. Tá Kjølar knappliga stóðu uttan forsangaran, Signar, valdu teir tríggir eftirverandi limirnir at jarða gamla bólkin og byrja av nýggjum við nýggjum navni og nýggjum konsepti.

Fyrstu ferð teir tríggir Henning, Jens Tummas og Jens Marni ristu Kjølar hamin av sær og spældu undir heitinum All That Rain var, tá teir hitaðu upp fyri danska bólkin TV2 í mars í fjør.

Manningin í All That Rain man vera tann mest roynda í Prix høpi. Teir vóru allir tríggir við Kjølum í finaluni í Prix '99 og Prix '97, og trummuspælarin Henning Nicodemussen var harafturat við í finaluni í Prix '95 við bólkinum Wolfgang.

All That Rain leggur í løtuni síðstu hond á fyrstu fløguna hjá bólkinum, sum helst kemur út um mánaðarskiftið apríl/mai.

*Tónleikararnir í All That Rain eru:*

| | |
|---|---|
| **Jens Marni Hansen** | **sang/guitar** |
| **Jens Tummas Ness** | **bassguitar/sang** |
| **Henning Nicodemussen** | **trummur/sang** |

# Clickhaze

Tónleikararnir í Clickhaze spældu fyrstu ferð saman í desember 1998, tá bólkurin stóð á palli í Losjuni í Gøtu. Hóast teir ongantíð høvdu vant saman fyrr, gekk tað væl á hesi fyrstu framførsluni, og stutt eftir teknaði Clickhaze seg til Prix Føroyar '99.

Bólkurin vann undankappingina í Miðvági, og bleiv beinanvegin kendur kring landið sum bólkurin við tí sermerkta tónleikinum, sum fleiri væntaðu sær nógv av.

Eftir Prix finaluna í 1999 hevur nakað verið at hoyrt til Clickhaze, men ikki so øgiliga nógv. Bólkurin hevur verið á palli í Losjuni í Gøtu og onkra aðrastaðni m.a. saman við Glorybox. Bólkurin spældi eisini á Ólavsøkukonsert í 1999 og 2000.

*Tónleikararnir í Clickhaze eru:*

| | |
|---|---|
| **Petur Jensen** | **sang** |
| **Jón Tyril** | **el-guitar** |
| **Bogi á Lakjuni** | **el-guitar** |
| **Jens Ladekarl Thomsen** | **bass** |
| **Høgni Lisberg** | **trummur** |
| **Eivør Pálsdóttir** | **sang** |
| **Mikael Blak** | **orgul** |
| **Bjarti S. Hansen** | **ljóðmaður** |

# Flux

Tá bólkurin Flux varð stovnaður fyri nøkrum árum síðan løgdu tónleikararnir seg beinanvegin eftir at spæla heimagjørdan tónleik, sum tá minti mest um punk, grunge og harðari rock.

Flux kom eitt sindur fram á føroyska tónleikapallin, tá teir vunnu Pop Top konsertina í 1998 og síðan spældu á ólavsøkukonsertini sama ár.

Rættiliga gjøgnumbrotið hjá bólkinum kom tíðliga árið eftir, tá Flux tryggjaði sær finalupláss í Prix Føroyum '99 við at gerast nummar tvey í undanumfarinum á Tvøroyri.

Eftir finaluna í ´99, blivu Flux rættuliga væl umtóktir, kanska serliga millum teir yngru áhoyrarnir, og lagið »Mr. Headless«, lá sum nummar eitt á »Fimtan teimum bestu«.

Fyrstu tíðina sást bólkurin spæla nokkso fitt ymsastaðni í landinum. men so gekk ein tíð har tað ikki hoyrdist so nógv til ungu mennirnar úr Eysturoynni og Havn, men á ólavsøkukonsertini í 2000 var Flux aftur at hoyra.

Flux leggur seg eftir at spæla nútímans tónleik.

*Tónleikararnir í Flux eru:*

| | |
|---|---|
| **Hans Marius W. Ziska** | **sang/guitar** |
| **Terji Skibenæs** | **guitar** |
| **Sveinur Gaard Olsen** | **trummur** |
| **Kristian í Vági Eliasen** | **bass/kór** |

# 200

Í 1996 tóku teir báðir Niels Arge Galan og Uni Árting, sum tá spældu í Mold, og Mikael Blak, sum tá spældi við Deep-End, seg saman um at stovna bólkin 200 við tí fyri eyga at gera og spæla alternativan tónleik á føroyskum.

Bólkurin hevði eitt lag á "Rock í Føroyum 2" og var við í innleiðandi umfarinum til Prix Føroyar i 1997, men ta ferðina kom hann ikki víðari.

Bólkurin 200 hevur verið til í sama líki síðan hann varð stovnaður, men av tí at tónleikararnir allatíðina hava luttikið í øðrum bólkum og fyrst og fremst hava sæð 200 sum eitt slag av "frítíðarbólki", hevur 200 ofta ligið í dvala í styttri og longri tíðarskeið.

Um árskiftið varð 200 tikin niður av hillini aftur og støvaður av til Prix Føroyar. Tá kom nýggi maðurin í bólkinum, Búi E. Dam, til, og saman skrivaði bólkurin nøkur nýggj løg.

200 kvalifiseraði seg til finaluna við at gerast nummar tvey í undankappingi í Miðvági.

*Tónleikararnir í 200 eru:*

| | |
|---|---|
| **Niels Arge Galan** | **gittar og »sang«** |
| **Búi E. Dam** | **gittar** |
| **Uni Árting** | **trummur** |
| **Mikael Blak** | **bass** |